## BMW-málið

Mánanáttina 9. november komu tveir ungir litaviskir menn við Norrønu til Føroya.

Bæði tollvald og politi halda vakið eyga við bilum og fólki úr baltisku londunum, sum smugla út stórar nøgdir av rúsevnunum.

Tollararnir kannaðu bilin væl, men einki teir funnu.

Menninir fóru og keyptu sær ferðaseðil til Íslands.

Áðrenn teir fóru ein túr, fingu teir at vita, at Norrøna fór til Íslands klokkan 14.

Men fyri veður avgjørdi skiparin at framskunda fráferðina tveir tímar.

Skrivstovan ringdi til ferðafólkini, eisini hesar báðar menninar, men teir svaraðu ikki á telefon±ini.

Tá ið teir komu oman á bryggjuna, hevði Norrøna lagt frá landi.

Varð ferðin ikki framskundað, vóru teir farnir við til Íslands. Tað var sostatt av tilvild, at teir komu fyri rættin í Føroyum.

Nakrar dagar seinni fingu politi og tollvald pray gjøgnum millumlandasamstarv, at stórur møguleiki var fyri, at rúsevni vóru í bilinum.

So varð farið at pilka bilin sundur, rúsevnini vórðu funnin, og menninir handtiknir.

Tað eydnaðist politinum og tollvaldinum í Føroyum at halda málið dult í vikuvís. Henda tíðin varð millum annað brúkt til at avlurta tey telefonnummarini, sum funnin vórðu í telefonunum hjá teimum báðum handtiknu monnunum. Soleiðis bar tað til, at funnið varð fram til mannin, sum hildin verður at hava verið høvuðsmaðurin í Íslandi og tvey onnur litavisk fólk, sum øll bíða eftir dómi í Íslandi.

*randi@sosialurin.fo*




# Góð trý ár handan rimarnar

**BMW-MÁLIÐ** 22 ár gamli litavin, sum fríggjadagin varð dømdur seks ára fongsulsrevsing fyri rúsevnissmugling, kann ongantíð aftur koma til Føroyar

Randi Jacobsen
Tekning: Janus D. Guttesen

Samstundis sum tann frídømdi 24 ára gamli vinmaðurin fríggjadagin setti seg í flogfarið á veg úr Føroyum, setti tann 22 ára gamli litavin seg enn eina ferð yvir av teimum tólv nevningunum.

Nevningarnir søgdu dagin fyri, at hin var sekur, men hesin 22 ára gamli litavin varð funnin sekur í rúsevnissmugling.

Tá ið nevningar døma, skulu teir ikki koma við grundgevingunum.

Fríggjadagin kravdi ákærin, at maðurin fekk harðastu revsing, sum er 10 ára fongsul, grundað á tey sera vandamiklu rúsevnini, sum vóru í bilinum. Nøgdin var eisini óvanliga stór.

Verjin kundi ikki longur krevja frádøming, tí nevningarnir høvdu dømt hann. Verjin kundi tí bara argumentera fyri linastu revsing, og hansara boð var tvey-trý ár í mesta lagi fýra ár. Hann vísti á, at tann ákærdi bara var ein lítil fiskur, og hann helt, at við tað at hann av tilvild varð tikin í Føroyum og ikki í Íslandi, hagar maðurin ætlaði sær, átti hann at verða dømdur eftir íslendskari siðvenju í slíkum málum, tað vil siga linari.

### Nógv stóð á

Tann ákærdi maðurin hevði tað alt annað enn gott hesa løtuna. Stundum sat hann bara og stardi, stundum helt hann sær um høvið, og av og á turkaði hann tár úr eygunum.

Við ásetningini av revsingini luttekur dómarin í avgerðini saman við nevningunum. Hvør av teimum tólv nevningunum hevur eina atkvøðu, og dómarin hevur tólv atkvøður.

Í hesum málinum var ikki full semja, tí tólv atkvøður vóru fyri at døma sjey ár, og tólv søgdu seks ár.

Úrslitið var seks ár, tí tá tað stendur á jøvnum, er dómurin tað linara kravið.

Tá ið dómurin fall, sást einki á tí 22 ára litaviska manninum, hvørki gleði ella harmi.

Makkari hansara varð frídømdur, ríkiskassin rindar sakarmálsútreiðslurnar, og hann hevur rætt til endurgjald fyri varðhaldsfongslingina.

Hesin maðurin skal í fongsul, hann skal rinda sakarmálsútreiðslurnar, og hann hevur ikki rætt til nakað endurgjald. Hann varð vístur úr Føroyum fyri lívið. Hin kann koma aftur, hevur hann lív, heilsuna og hug at vitja aftur.

### Nógv tilvild

Eftir at dómurin var fallin segði verjin Óla Jákup Kristoffersen við Sosialin, at eftir hansara tykki vóru smálutir orsøkin til, at annar maðurin varð dømdur og hin frídømdur. Nógv tilvildarligt gjørdi, at málið endaði, sum tað gjørdi, helt hann.

Báðir partar hava nú 14 daga umhugsunartíð um at kæra sjálva revsingina til hægstarætt

Óla Jákup Kristoffersen segði, at tað var ein trupul avgerð at taka, um revsingin kann kærast ella ei. Úrtslitið við at kæra kann tað sama gerast, at revsingin verður harðari. Og so er einku vunnið.

### Fær avsláttur

Um revsingin verður seks ár ella annað áramál, skal maðurin til Danmarkar at sita, tí umstøður eru ikki í Føroyum til drúgva fongsulsrevsing.

Hesar tvær vikurnar verður hann tó sitandi í varðhaldinum í Havn.

Seks ára fongsulsrevsing ljóðar av nógvum, men maðurin kemur illa at sita øll árini. Vanligt er at fáa ein triðing av so hørðum dómi eftirgivnar. Haraftrat gevur tað hálvt ár avsláttur, at hann hevur sitið varðhaldsfongslaður í hálvt ár, og fyri tríggjar mánaðir í isolasjón verður ein mánaður aftrat drigin frá.

*randi@sosialurin.fo*